## Spenningur settur til í Norðoya-tunlinum

**Spenningur er nú settur á háspenningskaðlarnar og transformarastøðirnar í Norðoyatunlinum**

ELVEITING

SEV hevur lagt tveir 20 kiloVolt háspenningskaðlar ígjøgnum tunnilin, sum hvør er 6.780 metrar til longdar. Annar kaðalin er streymveitingin til sjálvan tunnilin, meðan hin er lagdur ígjøgnum tunnilin í staðin fyri háspenningslinjuna, sum hongur tvørtur um Leirvíksfjørð.

SEV hevur eisini fimm transformarastøðir í tunlinum. Tær broyta spenningin úr 20.000 Voltum frá tí eina kaðlinum niður í 400 Volt, sum er spenningurin, ið øll útgerðin í tunnlinum brúkar.

Árliga elnýtslan í Norðoyatunlinum er mett til eina millión kWt.

# Nýggjur »Búgvi« á veg til Føroya




*Nýggi »Búgvin« er á somu støðd sum Hansa Maria*

**Sp/f Anana á Toftum við Theodor Poulsen hevur keypt nýggjan trolara. Hesin nýggi »Búgvin« er keyptur úr Danmark og kemur inn í flotan ístaðin fyri gamla »Búgvan«**

SKIPAKEYP
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað eru Kjartan Poulsen og Jan Davidsen, sum eisini eru eigarar saman við Theodori, ið sigla bátin heim. Við á ferðini er eisini Heðin Davidsen. Teir fóru frá Skagen á middegi leygardagin og eru nú á veg til Føroyar. Ferðin tekur umleið 2-3 dagar, alt veldst um á veðrið.

Nýggi trolbáturin er úr stáli og er bygdur í Hvidesande í Danmark í 200. Hann hevur verið heimahoyrandi í Grenå. Hesin nýggi Búgvin er á somu støðd, sum nýbygda Hansa Maria, sum Hans Andrias Poulsen, ið er bróðir Theodor og Kjartan, eigur.

# Góðir vinningar á Planet Galla

**Á Planet Galla kvøldinum á Hotel Føroyum verður tað besta innan føroyskan tónleik heiðrað. Men eisini tey, ið atkvøða um heiðurslønirnar, kappast um stórar og góðar vinningar**

PLANET.FO
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




Tað verður ikki bert føroyska tónleikalívið, ið fær vinningar á Planet Galla á Hotel Føroyum 28. januar. Tey, ið atkvøða við sms um Planet heiðurslønirnar, eru við í lutakasti um ferðaseðlar, eina fartelefon og eitt hald av Sosialinum.

Vinningarnir, ið kasta verður lut um, vera avbera góðir, ein ferð fyri tvey á rutunetinum hjá Atlantic Airways, ein Samsung E 730 fartelefon, og eitt árshald av Sosialinum. Kastað verður lut um í millum øll tey, ið hava atkvøtt um onkra heiðursløn.

Tað ber til hjá øllum fartelefonum við haldi hjá Føroya Tele at atkvøða, og hvør fartelefon kann atkvøða einaferð um hvørja Planet. T.v.s einaferð um bestu útgávu, einaferð um besta føroyska osfrv., hvør atkvøða telur sum ein lutaseðil í lutakastinum.

Nøvnini á vinnarunum verða kunngjørd á Galla veitsluni og løgd á planet. fo sama kvøld og prentaði í Sosialinum mánadagin 30. januar.

HANDILSLÆRLINGUR

Vit sóknast eftir handilslærlingi til handil okkara.

Skrivlig umsókn ynskist.

Kaj Andreasen & Co

BREKKUTÚN 7 · POSTBOKS 1200 · 188 HOYVÍK · TEL 31 56 00

Sosialurin 341800

## Er Bono ov nógv av tí góða?

U2 sangarin Bono er somikið nógv upptikin av ymiskum vælgerandi arbeiði, at hinir limirnir í bólkinum eru byrjaðir at troyttast av honum. Bono sigur við BBC Radio 4, at hann einaferð var bangin fyri, at hann fór at verða tveittur úr bólkinum orsaka av hesum.

Bono var í fjør ein av oddamonnunum í Make Poverty History herferðini og Live 8 konsertunum, og er dagligur gestur hjá ríkisleiðarum kring allan heim. Á konsertum hjá U2 er sangarin kendur fyri at rópa politiskar boðskapir av pallinum. Hann sigur við BBC, at hann er greiður yvir at, hinir limirnir andað í nakkan á honum, tá hann heldur politiskar røður av pallinum. T.d. tekur trummuleikarin Larry Mullen tíð, tá Bono heldur røður.

Bono sigur, at hann eisini sjálvur er greiður yvir, at áskoðararnir kunnu gerast troyttir av hansara nógvu og almennu meiningum um alt møguligt, hetta skriva Politiken á sínari heimasíðu.

**nud**

## Maria Guttesen við nýggjari útgávu



Her fyri fór bólkurin Divided Minds hjá føroysku Mariu Guttesen í søguna, men longu nú er Maria til reiðar at geva eina fløgu út sum einstaklingur. Talan verður um eina live-fløgu, sum væntandi kemur í handlarnar seinni í vár.

Fløgan verður spæld inn í hugnaliga konsertstaðnum SALON í Århus í sambandi við tvær konsertir, ið Maria heldur har dagarnar 4. og 5. mars. Á konsertini spælir Maria flygel og syngur, hon fer harumframt at hava onkran gestatónleikara við sær.

**nud**